# Hvat vil Fólkaflokkurin við eini tjóðskaparsemju?

FRANK DAVIDSEN
Sørvágur



Vit hoyra dag og dagliga frá nevnda flokki, ella rættari sagt frá floksformanninum, at hansara flokkur stendur við tær politisku semjur, ið gjørdar eru, samstundis sum hann gevur fólki ta fatan, at hinir samgonguflokkarnir eru ikki nóg seriøsir. Samstundis heitir hann nú á allar flokkar um at gera eina tjóðarsemju vegna sera álvarsligu búskaparligu støðuna, og her er tað fyrst og fremst orsaka tær sera ógvusligu hækkingarnar í almennu útrreiðslunum seinastu 10 árini.

Í sama viðfeingi kann hann ikki bara sær at halda spjaldramerkið hjá Fólkaflokkinum í hevd, hóast hann rættir hondina út til eina tjóðskaparsemju. Og spjaldramerki floksins er at lækka skattin. Ja tað er nærum ein deyðssynd at gjalda skatt yvirhøvur, og stóð tað til gamla stavnamannin fyri nøkrum árum síðani, so mælti hann til at gera Føroyar til eitt skattaparadis álíkt Isle of Man og líknandi oyggjasamfeløgum. Tíverri vísir tað seg nú, at hesar somu oyggjar mega standa til svars yvirfyri altjóða samfelagnum, tí tað hevur víst seg, at ein stórur partur av pengunum, ið hevur verið kanaliseraður til hesi skattaparadís, er mafiapengingur og peningur frá skattaundandrátti.

Vit hava eitt ríkidømi í okkara sjóøki, ið hevur eitt virði uppá fleiri milliardir krónur, men fyri Fólkaflokksins viðkomandi kemur tað als ikki uppá tal, at landskassin, og tað merkir skattgjaldarin, møguliga kundi fingið eitt lítið avgjald av hesum virðum, ið eru fólksins ogn. Tað kemur ikki upp á tal, sjálvt um okkurt felag er ført fyri at lata 250 milliónir krónur í vinningsbýti.

Eg og alt Føroya fólk eiga at vera errin og stolt av hesum monnum, sum við einum ótrúligum ágrýtni og dugnaskapi og ikki minst áræði í ringum tíðum, serliga kreppuárunum, ikki góvust á hondum. Tvørturímóti hava teir við hepnari hond ognað sær eitt av heimsins mest framkomnu veiðutólum, ið kann góðska fiskin umborð og harvið fleirfalda veiðuvirðið, samstundis sum veiðan harvið gerst meira burðardygg.

Ivist tó onga løtu í, at høvdu broytingar verið gjørdar soleiðis, at lógin un vinnuligan fiskiskap kravdi eitt lítið avgjald til landskassan tey árini, tá úrtøkan var góð, so høvdu hesir menn ikki havt stórvegis ímóti tí.

Orsøkin til, at okkara fiskifloti ídag stendur í eini botnleysari skuld, er fyrst og fremst umsetiligheitin og kapitaliseringin, har skuldin verður kanska trý ella fýrafaldað, so hvørt sum skip og fiskiloyvir hava skift eigara. Hetta er so takkað verið tí fiskivinnupolitikki, ið Fólkaflokkurin hevur staðið faddur at. Tað ger ikki støðuna betri, tá miðalaldurin á okkara fiskiflota kanska liggur um 25-30 ár.

Tá íð Fólkaflokkurin nú leggur upp til eina tjóðarsemju, er tað sera umráðandi, at allir flokkar á Løgtingi taka hann uppá orðið, soleiðis at okkara fiskivinnupolitikkur verður viðgjørdur og broyttur í hesi tjóðarsemju, sum Fólkaflokkurin sjálvur eftirlýsir.

Í dag er tað so, at um ein vil ogna sær eitt skip, so er tað ikki sjálvt veiðutólið, ið er trupuleikin, tá fígging skal fáast til vega, tí virði á veiðitólinum er bert ein lítil partur, meðan sjálvt fiskiloyvið hevur nógv størri virði. Tað er púra burturvið. Sostatt er tað ikki virðið á skipinum ið er orsøkin til, at stórur partur av fiskiflotanum er um at fara á húsagang.

Hinvegin er tað sum áður sagt tann førdi fiskivinnupolitikkurin hjá Fólkaflokkinum seinastu nógvu árini, sum saman við fíggingarstovnunum hevur tikið grundarlagið undan okkara fiskiskipaflota. Spekulasjón við fiskirættindum hevur givið seljarunum inntøkur uppá hundraðtals milliónir í summum førum, meðan teir sum í dag eiga veiðutólini eru við sviðu soð, og fleiri av teimun eru farnir á húsagang. Tí í staðin fyri skynsaman fiskivinnupolitik hevur Fólkaflokkurin ført ein ábyrgdarleysan profittpolitik. Úrslitið er, at fíggjarstovnarnir í dag eiga ríkidømið í okkara sjóøki.

# Starvsfólkatrot og bústaðarstøðan - hugleiðingar altjóða handicapdagin

TURIÐ JACOBSEN
Ergoterapeutur

Í dag er altjóða handicappdagur, í summar viðtóku vit ST sáttmálan um javnrættindi fyri fólk við breki og tað endaleysa kjakið um bústaðarviðurskifti hjá fólki við breki í øllum aldrum, sum eru umfataði av sáttmálanum, er aftur á skránni sum tveir ymiskir problematikkir. Samstundis ger Nærverkið vart við, at tað, at fólk gerast alt eldri, fer at økja nógv um tørvin á starvsfólki innan eldraøkið árini framyvir.

Í grundini eru allir hesir "trupulleikar" ella hvat mann nú velur at nevna tað - ein spennandi avbjóðing er tað í øllum førum - tætt tengdir at hvør øðrum. Eingin ivi er um, at bæði á starvsfólka- og bústaðarøkinum til bæði gomul og brekað, er nógv at heinta við at síggja hesi øki sum eina heild. Vit eru hóðast alt ein lítil tjóð við ikki óavmarkaðum tilfeingi.

Nú, vit hava viðtikið ST sáttmálan um javnrættindi fyri fólk við breki, eru skyldurnar og uppgávurnar hjá avvarðandi myndugleikum nógvar í tali. Ikki minst tá talan er um skyldurnar at gagnnýta verandi tilfeingi sum best. Her er tað so heppið, at tørvurin hjá øllum við niðursettum førleika á nógvum økjum er tann sami, í øllum førum tá talan er um krøv til fysiskar karmar og tørv á fakligum førleika hjá starvsfólkunum, tað verði seg, um talan er um gomul ella ung við breki.

Sum nú er, tykist tað, sum um tað einasta, sum liggur fast á bústaðarøkinum er, at byggingin av traditionellum røktarheimum og sambýlum heldur fram, hóðast tey hvørki eru tíðarhóskandi ella framtíðartryggjaði á tekniborðinum. Í besta føri leggja hesi ikki dent á at skapa møguleikar fyri búfólkið at vera virkin og í ringasta føri forða tey fyri, at mann kann vera virkin.

Meðni hesi ótíðarhóskandi røktarheim og sambýli verða bygd, ganga árini og bústaðarpakkin, sum hevur verið ávegis í áravís og ætlandi skal skapa hóskandi, fleksiblar bústaðarmøguleikar til fólk við breki, dregur út.

Onkra staðni skulu fólk, sum orsakað av breki hava tørv á serligum liviumstøðum jú búgva, meðni bíðað verður eftir bústaðarpakkanum. Hvussu búgva hesi so? Jú, tey búgva í nógvum førum í sonevndum sambýlum undir umstøðum, sum vit uttan brek ongantíð høvdu góðtikið. Hvussu nógvar hóskandi bústaðir kundu leiguinntøkurnar, sum tey í áravís hava goldið fyri hesar bústaðir, ikki havt havt fíggjað?

Tað hevði also verið áhugavert at skeitt at, hvat verður gjørt í okkara grannalondum. Har leggja tey seg eftir at byggja og skipa eldra- og brekøkið so, at borgari við niðursettum førleika, uttan mun til aldur, hevur møguleika at vera so virkin og sjálvbjargin sum gjørligt. Úrslitið verður tá bæði, at lívsgóðskan hjá borgaranum verður betri og tørvurin á røkt og hjálp verður minni.

Fyri nøkrum mánaðum síðan skrivaði Dennis Holm eina áhugaverda grein í bløðunum um ótíðarhóskandi mátan, vit byggja eldrabústaðir uppá og nú í vikuni luftaði Hermann Oskarsson nakrar sera skilagóðar tankar um tað sama í ÚF.

Er tað ikki at undrast yvir, at tankarnir við viðkomandi fakligum reflektiónum skulu koma frá fólki, sum ikki varða av økinum og ikki kunnu væntast at hava fakligt innlit, meðni tey, sum varða av økinum og eiga at hava fakligt innlit, bara tykjast at hugsa í ella í øllum førum einans planleggja í ótíðarhóskandi, traditionellum banum? Eg skilji tað so ikki ...

Hattin av fyri MBF og Lailu, at tit klára framhaldandi at vera konstruktiv í tykkara útmeldingum um støðuna.

**Góðan handicapdag!**

# Mótmæli av viðgerðini av heilsuverkinum í Suðuroynni

Eftir at nakað av kjaki nú í longri tíð hevur verið frammi millum landsstýrismannin í Heilsumálum og leiðsluna á Suðuroyar Sjúkrahúsi, viðvíkjandi fíggjarætlanini fyri 2010, har m.a. víst verður á tørvin á einum narkosulækna og yngri læknum til Suðuroyar Sjúkrahús, fyri framhaldandi at hava kommunulæknar í økinum, fara undirritaðu borgarstjórar í Suðuroynni, at seta fram krav um, at landsstýrið tekur hetta sera álvarsliga mál viðvíkjandi Suðuroynni upp til nýggja viðgerð.

Tað hevur verið ført fram av yvirlæknum á Suðuroyar sjúkrahúsi, virkandi kommunulæknum í oynni, og nú eisini av einum av teimum, ið vit væntaðu skuldi starvast sum kommunulækni í Suðuroynni, hvørja støðu hesir hava til málið.

Í samrøðu við Suðuroyarportalin, sigur ein, ið væntandi skuldi starvast sum kommunulækni í Suðuroynni, at tað kemur ikki upp á tal, at hann søkir eitt slíkt starv, við tí arbeiðs-og vaktarbyrðu, ið framtíðin hevur at bjóða.

Tá landsstýrismaðurin í heilsumálum førir fram, at Ólavsøkupakkin og harvið karmarnir longu vóru settir, tá hann tók við sum landsstýrismaður, so er hetta rætt.

Eftir áheitan greiddi leiðslan á Suðuroyar sjúkrahúsi, á fundi í mei mánað í ár, frá støðuni. Á fundinum vóru ikki minni enn tríggir landsstýrismenn úr Suðuroynni, tvey løgtingsumboð úr Suðuroynni saman við borgarstjórunum í Suðuroynni. Tá kunnað varð um trupulleikan, komu týðiligar ábendingar frá landsstýrismonnunum um, at hetta nokk ikki bleiv nakar trupulleiki at fáa uppá pláss.

Tí kunnu vit sum borgarstjórar ikki góðtaka, at undarførslur um Ólavasøkupakkan, verða nýttir í hesum føri.

Vit fara tí staðiligа at heita á okkara løgtings- og landsstýrisumboð umframt alt Føroya Løgting og Føroya Landsstýri, at síggja tann stóra álvara í hesum so ómetaliga týdningarmikla máli fyri trivnaðin og trygdina hjá ungum og eldri her í Suðuroynni, og at fáa til vega ta upphædd, ið skal til, fyri at tryggja okkara borgarum nøkunlunda somu heilsuviðgerðartilboð sum aðrastaðni í landinum.

*Borgarstjórarnir í Suðuroynni*
Kristin Michelsen
Kirstin S. Bech
Otto West
Hildur Vestergaard
Mikkjal Sørensen
Eyðdis Ellendersen
Delmar Tausen